# Hann bíðar eftir fínteljingini

**Andrias Petersen, kommunulækni í Gøtu, er fyrst valda valevni á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Eysturoynni. Men hann fekk bara eina atkvøðu meira enn løgtingslimurin Dan Reinert Petersen. Tí bíðar hann enn eftir fínteljingini**

LØGTINGSVALIÐ
*Stefan í Skorini*



*Andrias Petersen verður væntandi tað nýggja umboðið hjá Javnaðarflokkinum í Eysturoynni. Hann hevur verið landsstýrismaður í tvey ár, men hann hevur ongantíð sitið í tinginum*

Valið hjá Javnaðarflokkinum í Eysturoynni gjørdist sera spennandi. Bara ein atkvøða var ímillum Andrias Petersen og Dan Reinert Petersen, sum hevur umboðað Javnaðarflokkin á tingi seinastu fýra árini.

– Eg tori ikki at siga nakað, fyrr enn endaliga úrslitið fyriliggur, tá fínteljingin hevur verið, sigur Andrias Petersen. Hann vísir á, at ein atkvøða skjótt kann fara annan vegin, og so er alt knappliga broytt.

– Persónliga eri eg væl nøgdur við atkvøðutalið og við úrslitið hjá flokkinum í oynni, har vit hava eina lítla framgongd. Eg vónaði tó, at flokkurin fór at fáa eitt frægari úrslit samanlagt um landið, sigur nývaldi tingmaðurin í Eysturoynni, um fínteljingin ikki broytir nakað.

Hann hevði vónað, at flokkur hansara fekk ein mann afturat, men hann heldur tó ikki, at hetta er nakað ringt val hjá Javnaðarflokkinum. Andrias metir, at flokkurin hevur mist nógvar atkvøður í polariseringini millum loysing og samband.

Andrias Petersen er kommunulækni í Gøtu, og hann er ikki heilt óroyndur í politikki. Hann var landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum frá september 1994 til á sumri 1996, tá Javnaðarflokkurin fór úr samgonguni við Sambandsflokkinum og Verkamannafylkingini. Harumframt hevur hann sitið í bygdaráðnum í Gøtu síðan 1993. Hetta er tó fyrstu ferð, at hann er valdur inn á ting.

Stórar broytingar eru farnar fram í samfelagnum, síðan Andrias sat í landsstýrinum.

– Samfelagið var tá í svárari kreppu, og allir pengakassar vóru tómir. Nú seks ár seinni, er tað eitt heilt annað samfelag, vit liva í, sigur Andrias Petersen.

Hann hevur enn ikki gjørt av, um hann fer at halda fram sum lækni í økinum, nú hann væntandi fer í tingið.

### Fallin tingmaður

Dan Reinert Petersen gjørdist júst ov stuttur hesuferð. Honum vantaði bara eina atkvøðu, men hann væntar ikki, at fínteljingin fer at geva honum fleiri atkvøður.

– Eg vænti ikki, at eg komi innaftur á ting, sigur Dan Reinert Petersen, sum vísir á, at við seinasta val var hann bara átta atkvøður frammanfyri Andrias Petersen og nítjan atkvøður frammanfyri Sylverius Jacobsen av Skála, sum hesuferð var 29 atkvøður ov stuttur.



*Dan Reinert Petersen fer eftir øllum at døma ikki at halda fram í tinginum. Honum vantar eina atkvøðu*

– Man er ongantíð nøgdur, um man ikki endar ovast á listanum, sigur Dan um valið. Hann heldur, at stuðulin frá leirvíkingum til Andrias var avgerandi, tí Dan fekk heilt fáar atkvøður í Leirvík.

Dan Reinert Petersen, sum fekk 47 atkvøður fleiri hesuferð, heldur, at tann sterkasta samgongan nú hevði verið millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin.

Hann hevur ikki stórt álit á einari samgongu við 17 tinglimum við báðum teimum smærru flokkunum.

### Fínteljing fríggjdagin

Arnold Abrahamsen, formaður í valnevndini í Eysturoynni, væntar, at fínteljingin verður líðug fríggjadagin. Tað eru trý fólk, sum skulu standa fyri teljingini, og tí tekur tað nakrar dagar.

Hann sigur, at valnevndin ofta tekur atkvøður, sum valstýrini á valstøðunum í fyrsta umfari hava vrakað, við aftur. Tí um eingin ivi er um, hvønn flokk viðkomandi hevur ætlað at valt, so telur atkvøðan við. Tí kann nógv broytast undir fínteljingini, og spennandi verður at vita, hvørt tað verður Andrias Petersen ella Dan Reinert Petersen, sum fara í tingið fyri Javnaðarflokkin komandi valskeið.

# Borgarstjórar høvdu gott val

**Tríggir borgarstjórar vórðu hesuferð valdir inn á ting. Páll á Reynatúgvu varð afturvaldur, meðan Gerhard Lognberg og Heðin Zachariassen eru nývaldir**

LØGTINGSVALIÐ
*Stefan í Skorini*



*Heðin Zachariasen er nývaldur løgtingslimur fyri Fólkaflokkin. Hann heldur, at tað at hann er borgarstjóri hevur givið honum nógvar atkvøður*

Fleiri nývaldir borgarstjórar stillaðu hesuferð upp til løgtingsvalið. Misjavnt var, hvussu valið hilnaðist hjá teimum.

Tríggir komu í øllum førum inn á ting. Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu, kom inn sum eykavaldur í Norðurstreymoy, Gerhard Lognberg, borgarstjóri í Skopun, er umdømisvaldur á Sandoynni og Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi, varð afturvaldur.

### Leggur starvið frá sær

Hetta var fyrstu ferð, at Heðin Zachariasen, sum býr á Streymnesi, royndi seg til løgtingsval. Hann fekk 149 persónligar atkvøður.

Heðin er farin undir sítt næsta valskeið sum borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu, og hann er farin undir sítt triðja valskeið í bygdaráðnum, og tað hevur verið til hansara fyrimun, heldur Heðin.

– Tað hevur avgjørt eina ávirkan, at eg frammanundan eri borgarstjóri í kommununi. Fólk síggja, at vit reka ein skynsaman fíggjarpolitikk, og tað vísir seg aftur til løgtingsvaldið, sigur Heðin Zachariasen.

Hann er annars sera væl nøgdur við valið, og at fólk har norði stóðu saman um eitt valevni. Til kommunuval hevur hann ongantíð fingið fleiri enn 68 atkvøður. Hann er fegin um, at Fólkaflokkurin aftur fekk eitt umboð í valdøminum, nú Jákup Suni Joensen ikki stillaði uppaftur.

Heðin Zachariasen hevur verið arbeiðsformaður hjá IRF, og hann hevur staðið fyri innsavning av ruski, bingjuplássum og øðrum. Hann hevur havt seytjan mans undir sær, men hetta starvið leggur hann nú frá sær og fer at halga seg til borgarstjóra- og tingstarvið.

### Aðrir borgarstjórar

Hinvegin vóru aðrir borgarstjórar, ið ikki høvdu eitt gott val. Tordur Niclasen er borgarstjóri á Eiði, men Miðflokkurin hevði stóra afturgongd í heimbygdini hjá borgarstjóranum. Flokkurin fekk 138 atkvøður við seinasta val, men bara 49 hesuferð. Tordur fekk tó 150 persónligar atkvøður tilsamans. Leivur Hansen, sum júst er farin frá sum borgarstjóri í Havn, fekk bara 25 atkvøður, so tað er ikki hjá øllum, at borgarstjórastarvið hevur ta neyðugu ávirkanina.

Aðrir borgarstjórar, sum bjóðaðu seg fram hesuferð, vóru Jógvan Krosslá fyri Tjóðveldisflokkin í Vági og Finnleif Guttesen fyri Sambandsflokkin á Tvøroyri. Teir komu tó ikki inn.

Fólkafloksmenninir Poul Michelsen og Jógvan við Keldu, fyrrverandi borgarstjórar, bjóðaðu seg eisini fram. Jógvan við Keldu varð afturvaldur í Norðoyggjum, meðan Poul Michelsen ikki kom inn á ting, hóast hann fekk 293 persónligar atkvøður.



# Vil minnast vallyftini

**Nývaldi løgtingsmaðurin í Sandoynni, Gerhard Lognberg í Skopun, sum valdur er fyri Javnaðarflokkin, er ovfarin av valúrslitinum og sigur, at hann fer at halda seg til givin vallyfti, tá hann tekur sæti á tingi**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*



*Eg fari at minnast míni vallyfti og arbeiða fyri, at tey koma í eitt møguligt samgonguskjal, sigur nýggi Sandoyartingmaðurin, Gerhard Lognberg*

Gerhard Lognberg er ovfarin av valúrslitinum. Hann fekk flestar persónligar atkvøður í Sandoynni, har Javnaðarflokkurin gjørdist størsti flokkur. Samstundis gjørdist Gerhard Lognberg tann, sum í mun til atkvøðutalið í valdøminum fekk flestar persónligar atkvøður í øllum landinum.

– Hevði Javnaðarflokkurin havt líka gott val allastaðni sum á Sandoynni, hevði staðið væl til, sigur hann.

Gerhard Lognberg sigur, at hann væntar, at tað verður trupult at koma uttan um Javnaðarflokkin, tá samgonga skal skipast. Og hann dylur ikki fyri, at hann ætlar sær at gera sína ávirkan galdandi í tinginum til frama fyri Sandoyar valdømi.

– Kemur tað hartil, at vit sleppa í eina samgongu, vil eg liggja framvið at fáa tað við í eitt samgonguskjal, sum eg er valdur uppá, sigur nýggi sandoyartingmaðurin.

Hann nevnir eitt nú umstøðurnar í Skúvoy, sum avgjørt mugu betrast, eins og eitt aliloyvi á Sandsvág liggur frammalaga á listanum.

Men tunnilin til Dals eigur kortini at vera fyrst, heldur hann, og síðan eigur at verða farið undir at kanna umstøðurnar viðvíkjandi undirsjóvartunli til Sandoynna.

– Eg veit væl, at tað verður ikki nakað, sum gjørt verður beinanveg, men kanningarnar eiga kortini at verða gjørdar, so vit vita, um tað er realistiskt at hugsa um tað í framtíðini, sigur Gerhard Lognberg.

Hann vísir á, at Sandoyggin hevur altíð ligið eftir, tá býtt hvur verið út av almennum arbeiðsplássum. Eitt nú, tá umsitingin varð løgd út ymsastaðni. Í Sandoynna kom einki, og tað heldur nýggi javnaðartingmaðurin í oynni, at nakað má gerast við.

Gerhard Lognberg sigur, at hann í løtuni ongar hugsanir hevur um, hvussu verður við eini samgongu. Hann er nývaldur og partur av einum flokki, og tað man formaðurin fara at úttala seg um, heldur hann.

Gerhard Lognberg væntar gott samstarv við hin tingmannin úr Sandoynni í komandi valskeiði, sigur hann. Páll á Reynatúgvu úr Tjóðveldisflokkinum, varð afturvaldur sum seinni tingmaðurin fyri Sandoynna.

# Brennievnið gongur undan

**Biltúrarnir í Vágum fara at fækkast komandi dagarnar, um verkfallið stendur við. Brennievnið til bilarnar er farið at ganga undan á bensinstøðunum, og ikki slepst um Vestmannasund eftir meira**

VERKFALL
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Dieseloljan til bilar er uppi í Vágum, og bensinið er eisini farið at fjara í tangunum. Eingin goymslutangi er í oynni, og ikki slepst um Vestmannasund við tangabilum at fylla íaftur.

Skelti eru nú komin á dieselpumpurnar á støðunum í Vágum, har sagt verður, at einki brennievni er eftir til teir bilarnar, sum koyra við diesel.

Bensintanarnir eru ikki tómir enn, men har er farið at fjara álvarsliga í summum.

Hjá Mylluni í Miðvági, sum selir bensin fyri Shell, siga tey, at týsdagin seldu tey einar 3.000 litrar av bensini. Fólk løgdu undir seg, verður sagt.

Tá latið varð upp týsmorgunin, vóru einir 7.000 litrar av bensini í tanganum. Tað er tað sama, sum vanliga verður selt eina viku, verður sagt. Men út í móti helvtini varð selt bara týsdagin, og væntandi var, at týskvøldið mundi fara at vera ræ ttiliga lítið eftir. Diesel olja til bilar var eingin eftir.

Á Statoil støðini í Sørvági var ikki fult so galið við bensininum. Har væntaðu tey, at ey mundu hava bensin eftir til eina viku ella so í hvussu var. Men diesel var heldur einki eftir har úti mikumorgunin, tá tosað varð við støðina.

Snorri á Steig, sum er avgreiðslumaður hjá oljufelagnum Shell í Vágum, sigur, at eingir tangar eru í oynni til at goyma bensin og bildiesel í.

Koyrt verður við tangabilum til Havnar, hvørja ferð, fyllast skal á goymslurnar hjá bensinstøðunum í Vágum. Og so leingi verkfallið leggur strandfaraskipini lamin, verður eingin bilur fluttur um Vestmannasund.

Hin vegin nýtist vágafólki ikki at óttast fyri at sita køld heima, hóast verkfallið er, tí goymslutangar eru í Sørvági til vanligu húsarhalds brennioljuna, og har verður fylt á frá tangaskipi, sum kemur við jøvnum millumrúmum.


